HSF
s 1023
rshavn
319669
312421
@hsf.fo
.hsf.fo

Hondbóltssamband Føroya
The Faroese Handball Federation

1. Um dómararnir innan dystarbyrjan meta at annað liðið/málverjar skulu skifta troyggju, tí tað, vegna lit samanfall, kann órógva spælið, hava liðini skyldu at lurta eftir teimum.

    a. Um so er at málmennirnir á báðum liðum hava sama troyggjulit, so er tað málmaðurin hjá útiliðnum, sum skal skifta málmanstroyggju.

    b. Um so er, at útileikarar og málmenn hava sama troyggjulit, so er tað altíð málmaðurin, ið skal skifta troyggju.

    c. Liðini eiga at tryggja sær, at fleiri málverja troyggjur við ymiskum litum eru tøkar til einhvønn dyst.

    d. Um man ynskir at skifta málmannin út við ein útileikara, skal hesin bera sama nummar á rygginum sum við dystarbyrjan, eisini eftir at hann hevur loyst málmannin av.

        i. Velur man at fremja hettar skifti eru tveir møguleikar, antin skal nýtast ein serligt gjørd málmanstroyggja, neyvari lýsing av hennið er at síggja undir "Dansk kommentar" aftaná reglu 4:8

        ii. Ella liðið áðrenn hevur avgjørt hvør av útileikarunum ger skiftið, so ber til at nýta eina málverja troyggju við sama tali sum valdi útileikarin hevur frá byrjan.

2. Tað ber ikki til, undir nøkrum umstøðum, at nýta vestar fyri at gera skilna á litunum hjá báðum liðum.

3. Tað ber ikki til, undir nøkrum umstøðum, at venda troyggjunum á ranguna fyri at gera skilna á litunum hjá báðum liðum.

4. Litur á troyggjum hjá venjarum/liðleiðarum skulu víkja frá litunum hjá leikarunum, tó málverjar undantiknir.

5. Um ein leikari fær blóð á troyggjuna, má hann út at vaska tað av, áðrenn hann kemur inn aftur á vøllin. Annars verður víst til reglu 4:10 í hondbóltsreglunum.

**Annars verður víst til reglur 4:7,4:8 og 17:13 í hondbóltsreglunum.**